# Frágreiðing frá nevndini, sum ger uppskot Norðurlendsku Bókmentavirðislønina

**Virksemi í 2011**

Í nevndini eru: Kinna Poulsen, Ann Ellefsen og Bergur Djurhuus Hansen, formaður.

Nevndin hevði tríggjar formligar fundir. Avgjørt varð at skjóta upp stuttsøgusavnið *Gullgentan* eftir Hanus Kamban til Norðurlendsku Bókmentavirðislønina í 2012. Í samráð við rithøvundin varð Kirsten Brix vald til týðara. Týðingin, *Guldpigen*, var klár longu í august 2011, og send limunum í norðurlendsku dómsnevndini beint eftir, at øll uppskotini til virðislønina vórðu almannakunngjørd 1. desember. Føroya Prent tók sær av at seta upp og prenta, og eins og undanfarin ár rindaði Mentamálaráðið bæði prent- og postútreiðslur. Ein útgreinandi lýsing av stuttsøgusavninum varð send limunum í norðurlendsku dómsnevndini og løgd út á heimasíðu Norðurlandaráðsins (http://www.norden.org/sv/nordiska-raadet/nordiska-raadets-priser/nordisk-raads-litteraturpris/press/nominerade-2012/hanus-kamban-guldpigen-faeroeerne).

Formaðurin í føroysku nevndini er limur í norðurlendsku dómsnevndini, og dómsnevndin hevði fund í Oslo 11.-12. apríl. Á fundinum varð avgjørt at lata Gyrðir Elíasson úr Íslandi Norðurlendsku Bókmentavirðislønina 2011 fyri stuttsøgusavnið *Milli trjánna*. Føroyska uppskotið í 2011 var yrkingasavnið *Útsýni* eftir Tórodd Poulsen. Hetta var fyrstu ferð, at Áland var við, og tískil var eisini talið av verkum í uppskoti hægri enn nakrantíð fyrr, 14 í alt.

Tórshavn 23.02.2012
Bergur Djurhuus Hansen